**Fjørukráin á Hafnarfirði gevur teimum vitjandi eina heilt serstaka uppliving, har stuttleiki og hugni er í hásæti, meðan ferðin gongur fleiri øldir aftur í tíðina**



**ÍSLAND**
**Jákup Mørk**
jakup@sosialurin.fo




Hetta kvøldið vórðu tríggir av gestunum tiknir í eið sum rættir víkingar

# Dansur og gleimur í **Víkingahøllini**



- Tá vit nú búgva í landinum, sum fram um onnur er kent fyri sínar víkingar. Hví ikki skapa eina uppliving, har tey vitjandi kunnu kenna seg sum víkingar?

Tá Jón Viðar Bjarnason fyri knøppum 20 árum síðani hevði sett sær hendan spurningin, vardi tað ikki leingi, áðrenn tanki gjørdist til veruleika. At byrja við sum eitt nostalgi-projekt, har næstelsti bygningurin í Hafnarfirði var karmur um barr og matstovu í víkingastíli, men í dag fevnir projekti eisini um stóru fjørukrónna, har 360 fólk kunnu sita til borðs, Hotel Víking og ikki minst ein árligan víkingafestival, har víkingar úr øllum heiminum í eina viku flyta bæði seg sjálvar og festivalgestirnar 1.000 ár aftur í tíðina.

Og skal tað vera stuttligt, so lat tað vera stuttligt. Við tríhyrntum ávaringarskeltum fáa gestirnir at vita, at her ráða víkingarnir, og er ynski til tess, kann alt ferðalagið takast sum gíslar av víkingunum, sum føra gestirnar inn í sítt helli, og so er klárt til veitslu.

Undirhald og góður matur er í hásæti, tá veitslan er á skránni.

Fyri at taka tað seinna fyrst, so ber til at bíleggja sær mat eftir egnum ynski, so har er eingin orsøk at setast aftur vegna kræsni.

Vit kunnu tó róliga viðmæla víkingamenu'ina, sum Jón Viðar borðreiddi við á degnum. Vanliga bjórið varð skift um við heldur søtari Mjøðin, og annars var talan um havkall (sum slettis ikki er so galin, sum fleiri vilja vera við), turran fisk, fiskasúpan og lambskjøt. Og sjálvandi ikki at gloyma íslendsku serdessertina – skýr og bláber.

Og meðan hetta verður notið, standa servandu víkingarnir fyri undirhaldinum. Um tað so eru fornnørrøn ritualir, fangandi vísusangir ella skemtisøgur undir beltinum, eru væl hýrdu norðbúgvarnir til reiðar at fanga fólkasálina, soleiðis at láturvøddarnir verða væl vandir, samstundis sum nakað av nørrønari søgu fæst í lærdómsskjáttuna.

So alt í alt er valið fyri skránna í Íslandi sera einfalt, tá um undirhald ræður. Fjørukráin í Hafnarfirði er eitt veruligt must.



Jón Viðar Bjarnason er føroyavinur burturav. Soleiðis er serstakt føroyakvøld fastur partur av árligu skránni, og gjøgnum fleiri enn 30 vitjanir hevur Jón Viðar knýtt hópatals vinarbond á oyggjum okkara



Bæði matur og undirhald er í serflokki, tá vitjað verður á Fjørukránni